




FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



Starvslýsing:

## WEB-HØGGUSLOKKUR

**KT-tænastan á Fróðskaparsetri Føroya leitar eftir fyrstafloks web-høgguslokki**

Við hesum verður lýst eftir fólki til KT-tænastuna hjá Fróðskaparsetri Føroya at byrja skjótast gjørligt. Setrið er í vøkstri, KT-kervið og krøvini til hetta er í støðugum vøkstri og uppgávurnar gerast alsamt fleiri og meiri fjølbroyttar. Tískil hava vit nú brúk fyri einum fjøltáttaðum KT-fólki við denti á kunnleika til nútímans webtøkni.

Starvið fevnir fyrst og fremst um menning og dagligt viðlíkahald av heimasíðuni www.setur.fo. Umsitarin skal røkja síðuna í neyvum samstarvi við úrvald starvsfólk á ymsu deildum Setursins. Fyrimun hava umsøkjarir við góðum førleika í grafikk-framleiðslu og myndaviðgerð og við royndum við CMS-skipanum.

Eisini hevur KT-Tænastan ymiskar menningar-verkætlanir í umbúna og fólkið, ið verður sett í starv, skal eftir førimuni eisini taka lut í hesum arbeiði. Grundleggjandi kunnleiki til arbeiði við nøkrum av fylgjandi: ASP, . NET, PHP, Perl, SQL, XML, XHTML, AJAX verður væntað av umsøkjara.

Harumframt kann roknast við onkrum uppgávum í samband við tann dagliga raksturin av Traðarnetinum.

Hevur tú onkran spurning um starvið, er tú vælkomin at senda teldupost til Óla Simonsen KT-leiðara, á olis@setur.fo. Eisini ber til at ringja til Óla í vanligari arbeiðstíð á 352570.

Umsókn við CV og prógvi um viðkomandi útbúgving og/ella royndir skal sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
ATT: KT-starv
J.C. Svabosgøta 14
FO-100 Tórshavn

Freistin at søkja er mánadagin 13. oktober 2008.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

KT-tænastan er deild hjá Fróðskaparsetrinum beinleiðis undir setursfyrisitingini, sum er dagliga leiðsla stovnsins. Tænastan hevur dagliga raksturin av Traðarnetinum um hendi; Traðarnetið er dátunetið hjá undirvísingar- og granskingarstovnunum á Debesartrøð, og veitir stovnunum ymsar tænastur, so sum Internet-atgongd, firewall, virusverju, teldupost-ambætara, fílugoymslu, webhotell, backup, undirvísing, ráðveging o.a. Undirstøðukervið á okkara neti byggir m.a. á Cisco, Novell, VMware, Linux og Windows.



Nokia 2630

# Septembertilboð

Fartelefon við Bluetooth, VGA-myndatóli, FM-útvarpi, 11 MB minni, kalendara, vapp og myndaboðum.

Fæst á vodafone.fo og í vodafone-handlunum.

**kr. 795**




Løtan er tín

vodafone



Ov tíðliga í verðina

Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo




Lesið Sosialin -so eru tit við!